## Popczynski kiksaði

Aarhus Fremad hevur fingið góð úrslit, síðani 2. deild vestur í Danmark byrjaði aftur. Venjarin Krzystof Popczynski hevur havt sum mál, at felagið skal flyta upp í næstbestu deildina, men ósigurin ímóti Esbjerg um vikuskiftið kom illa við hjá Popczynski og teimum. Aarhus Fremad spældi á heimavølli ímóti Esbjerg II og mátti lúta 2-0.



## Úti av liguni eftir 89 ár

Enska felagið Luton, sum áður hevur spælt í bestu deildini í Onglandi, er nú flutt niður úr League 2, og harvið verður felagið næsta kappingarár fyri fyrstu ferð í 89 ár ikki umboðað í ensku liga-skipanini. League er fjórðbesta deildin í Onglandi, og Luton hevur havt truplar umstøður, tí felagið varð frátikið 30 stig orsaka av fíggjarligum óskili í felagnum.

# Tjaldur tordi at taka av

**Fyri fyrstu ferð í føroyskari hondbóltssøgu er meistaraheitið í kvinnuhondbólti endað í Runavík. Tjaldur bæði tordi og vildi taka av, tá tær høvdu møguleikan, meðan bangna heimaliðið legði rygg til sítt største heimatap í 10 ár**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Støðan var sum so ikki heilt óvon hjá Stjørnuni. Bæði í fjør og í fyrraárið hevði Stjørnan verið finaluklár í fleiri vikur, áðrenn finalurnar stóðu á skránni. Tí møttu tær í báðum førum væl trimmaðari mótstøðu, og í báðum førum endaði fyrra finalan við tapi til Stjørnuna.

Bæði í fjør og fyrraárið vístu tær hjá Stjørnuni tó, at tær kundu traðka í karakter, tá mest stóð á. At tær enn vóru liðið, sum á degnum var tað besta í landinum.



### Bangnar

Men triðju ferð gekk altso galið. Tapið í fyrra finaludystinum var tepurt, men tað gjørdi aftur, at Stjørnan stóð við rygginum móti múrinum. Einasti munurin hesa ferð var, at tær als ikki vóru førar fyri at tackla trýstið, sum hetta legði á tær.

Fyrsta korterið av dystinum í Klaksvík gekk annars javnt á. Og um nakað, so hevði Sjtørnan kanska eina lítla yvirvág. Ein yvirvág, sum kanska kundi verið størri, um ikki støðugt mansvarda Adina Petrea langaði alt, sum líktist einum tríggjametra-kasti út um málverjan men innanfyri stólparnar.

Á korterinum togaði Tjaldur seg upp á 8-7, og júst tann løtan var tann sálarliga avgerandi í dystinum. Hóast dysturin framvegis var fullkomuliga opin, so skræddi hetta alt, sum líktist sjálvsáliti úr spælarunum hjá Stjørnuni. Teknisku villurnar øktust í tali, og heldur enn at stríðast í felag og vinna seg aftur á »back to basics«, byrjaðu spælararnir í sjálvdrátti at stríðst móti einum Tjaldursliði, har útlendsku profilarnir avgjørt hava sítt at siga. Men har allar á liðnum samstundis vístu og vístu, at hondbóltur er eitt liðspæl.

Kanska hevði Stjørnan ein lítlan møguleika at toga seg aftur í dystin, um tær gjørdu eitt gott hál, tá seinni hálvleikur byrjaði. Leikliga var hendan løtan eisini góð hjá vertunum, men tá Guðrun í Lágabø samstundis togaði sína bestu løtu í dystinum fram, var einki at gera. Stjørnan gav upp alla vón um at endurvinna meistaraheitið.



*Gullið er veruleiki. Spælararnir hjá Tjaldri tustu saman, tá floytan í KÍ-høllini hevði floytað fyri seinastu ferð hetta kappingarárið*

### Tordu og vildu

Men tá tað er sagt, so skal